

# Fysioterapeutur
## til Heimavitjanartænastuna

Fyri at økja um venjingartilboðini til eldru borgararnar í Tórshavnar kommunu søkir Heimavitjanartænastan eftir fysioterapeuti.

**Arbeiðsuppgávurnar**
At skipa fyri venjingum fyri pensionistar. Venjingartilboðini skulu innihalda fyribyrgjandi og viðlíkahaldsvenjingar, ið hava til endamáls, at tey eldru longst til ber verða sjálvhjálpin í gerandisdegnum heima og úti.

**Vit ynskja**
At tú hevur útbúgving sum fysioterapeutur og royndir og áhuga at arbeiða við eldri fólki og hevur kunnleika til:
- Vanligar ellisbroytingar og ellissjúkur
- Heilsufremjan og fyribyrging
- At meta um førleika
- EDV á brúkarastøði
- Er fyrikomandi og álitisvekjandi
- Kann arbeiða sjálvstøðugt

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála millum Felagið Føroyskir Fysioterapeutar og Fíggjarmálastýrið. Tú kemur at starvast í Fysioterapiini á Tjarnargarði. Starvið verður sett skjótast til ber í seinasta lagi 1. september 2008.

Starvið verður skipað undir Trivnaðarfyrisitingini í Tórshavnar kommunu.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Jónvør Christiansen, leiðara fyri Heimavitjanartænastuni, á telefon 30 20 63 millum klokkan 8-9, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, á 30 20 10.

**Umsókn**
Saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 10. juli 2008. Setanarsamrøður verða í viku 29.

Merkið umsóknina Fysioterapeutur til Heimavitjanartænastuna.

**Tórshavnar kommuna**



# Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir eftir dugnaligum og ágrýtnum starvsfólki til at vera skrivari hjá stjórunum.

Starvið er partur av einum toymi við tveimum skrivstovufólkum, ið taka sær av uppgávum hjá tekniska stjóranum, trivnaðarstjóranum og miðfyrisitingarstjóranum. Tú kemur m.a. at taka ímóti viðskiftafólki, avgreiða telefonsamskifti og skriva brøv. Tú kemur eisini at avgreiða fundarskráir og fundarfrásagnir í nevndum.

Harafturat verður nakað av arbeiði við at dagføra heimasíðuna.

Sum partur av toyminum er neyðugt at verða ábyrgdarfullur, smidligur og duga væl at samstarva.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er at hava skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving. Neyðugt er eisini at duga væl at samskifta á føroyskum, bæði skrivliga og munnliga.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya í 3. lønarflokki.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, telefon 28 00 20, ella Janus Isfeldt, telefon 21 03 30.

**Umsókn**
saman við avritum av viðmælum, útbúgvingarprógvi og upplýsingum um royndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 11. juli 2008, kl. 15.00.

**Tórshavnar kommuna**